

memo board

magnetic

## Jólakappingin

Nú stendur annað umfar í jólakappingini fyri durum, og nú er tað tíðin komin hjá tykkum at luttaka.

Hesuferð er tað eitt sitat úr einum filmi, sum verður borðreitt við. Tit skulu fortelja okkum, hvør tað er, sum hevur sagt hetta, og hvørjum filmi tað var í. Navnið kann verða antin navnið hjá leikaranum í filminum, ella veruliga navn hansara.

Sitatið ljóðar soleiðis: »... I'm having an old friend for dinner....«

Sendið svar tykkara til okkara á adressuni:

<ph_1>
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Ella á teldupostbústaðin: ph_1@ sosialurin.fo
og til ber eisini at senda okkum eitt fax á nummarinum: 31 47 20

Seinasta freist at luttaka í hesum umfarinum av kappingini er týsdagin 3. desember

Móti er til kvinnur, sum ikki hava smak og ein etikett til menniskju uttan uppaling.
— Maria av Rumenia

Sálum okkara nýtist ikki eins nógv klæðir og kroppur okkara.
— Samuel Butler

Hjartað fær ongantíð rukkur
— Madame de Sévigné

Eitt vakurt menniskja er eitt menniskja við ljótum hugskotum
— Jonathan Swift

## Grønar nummarplátur til prutl

Vinnumálaráðið hevur gjørt av, at eftir 1. november í ár skulu øll prutl í Føroyum skrásetast.

Nummarpláturnar, sum eru minni enn nummarpláturnar á bilum, hava bókstavar og tøl og ein grønan kant.

Øll nýggj prutl, sum eru keypt eftir tann 1. november í ár skulu skrásetast og kannast áðrenn tey sleppa út á vegin at koyra, og øll brúkt prutl, skulu verða kannað og skrásett áðrenn 1. juli 2003.

Kanningarnar, sum fara fram á bileftirlitinum, kosta 350 krónur, og sjálv nummarplátan kostar 250 krónur. Eisini skal prutlið verða tryggjað og prógv um trygging skal takast við til kanningina.



# Van the Man



Van Wilder er hin atypiski college-nemingurin. Hann hevur gingið á skúlanum í sjey ár, og hevur sum so ongar ambitiónir um at gera seg lidnan. Babba sendir feita check'in, ið rindar fyri lívsins uppihald, og annars er tað bara ball, ball, ball.

Ikki fyrr enn babba skrúvar fyri heita vatninum, gerst støðan álvarslig hjá Van. Megnar hann ikki at útvega nógvar túsund dollars, sleppur hann ikki at halda fram á Coolidge College. Alternativar loysnin gerst at skipa fyri feitum festum saman við vinmanninum Hutch og indiska AFS-næminginum Taj, sum hetta árið gjørdist tann hepni at fáa arbeiði sum persónligi hjálparmaður hjá Van.

Filmurin Van The Man er ein filmur um lívið á einum amerikanskum college. Kanska ikki óvæntað er hann ikki um lívið í skúlatímunum, men heldur um lívið eftir skúlatíð og tey mongu ballini.

Mótsetningurin til ball-leyvuna Van er Grace. Hon er seriøs í skúlanum og skrivar m.a. fyri skúlablaðið. Hon fær til uppgávu at skriva eina forsíðu um Van Wilder – mannin, ið øll á skúlanum dyrka. Tað skal vísa seg at vera truplari enn av fyrstan tíð væntað, men sum frálíður fáa tey bæði, Van og Grace, hug á hvørjum øðrum. Trupulleikin er bara, at Grace gongur saman við einum yvir-seriøsum og yvir-nørdutum læknalesandi, ið ikki hevur hugskot til at hugsa um nógv annað enn seg sjálvan og sína karrieru. Hansara leiklutur verður spældur nærum til tað ekstrema, og sum hyggjari spyr tú kanska teg sjálvan, hvat tað í grundini var sum gjørdi, at tað av fyrstan tíð blivu tey bæði.

Van The Man er ikki ein filmur við djúpum morali, og enn minni einum manuskripti, ið stingur djúpt. Tvørturímóti er hann ein filmur um at ball, og um at hava tað stuttligt – men tað er nú ikki so galið kortini. Skal ein allíkavæl tosa um moral í filminum, so má tað vera, at øll eru vit góð til okkurt og at tá vit møta tí rætta, so broytir tað okkara lív. Tá Van møtir Grace opnar hann seg, og aftan fyri eina coola facadu síggja vit ein mann, ið ikki torir at taka stigið út í veruliga heimin. Hann stórtrívist á college, og har kundi hann gott hugsað sær at verið verandi. Men tá tað veruliga umræður, so er dugur í honum kortini.

Veit ikki rættuliga, men eitt ella annað stað líkjast teir allir, hesir amerikansku skemtifilmarnir um lívið og ballini á college. Men kortini keðir tú teg ikki, tann góða hálva annan tíman, filmurin varir. Filmurin verður hildin uppi við stuttligum brotum og fínur replikkum, ið kortini ikki krevja tann stóra heilafimleik.

### fakta um van the man

| | |
|---|---|
| leikarar: | ryan reynolds, tara reid, tim matheson, kal penn o.o. |
| longd: | 93 min. |
| stað: | havnar bio, um tú ert 12 ár ella eldri |

# Ung orð: Treylaraførari eitt mótaarbeiði?

**nú á døgum er tað blivið meira og meira populert at taka tað stóra koyrikortið, ikki bara millum mannfólk, men eisini millum konufólk.**



Vit fóru ein túr við einum treylarasjaføri, ið skuldi til Havnar henda dagin eftir salti.

Í bilinum var nógv órudd at síggja, men eitt ógvuliga hugnaligt umhvørvi.

Veðrið var av tí fagrasta, sjálvt um tað var kavi oman av fjøllunum, og at tað var kalt fingu, vit so sanniliga at merkja, av tí at ventilatiónin var góð, vindeygað var víðopið alla tíðina.

Vit møttu eini rúgvu av stórum bilum hendan dagin, millum annað Hera Thomsen, Ian Rasmussen, OCD, Strandferðsluni og so víðari. Sum tað sá út, er samanhaldið gott, og sjaførarnir kennast væl, teir bæði vinka og floyta, tá teir møtast.

Vit spurdu bilføraran, hvat tað besta við at koyra trailara var, hann svaraði, at man lærir nógv fólk at kenna, og arbeiðið varierar nógv, og so legði hann eisini dent á, at lønin er super. Men tað kann eisini vera strævið av og á, tá fara teir til arbeiðis tíðliga á morgni og eru ikki heima aftur fyrr enn seint á kvøldi, men tað ger einki fyri teir ungu og leysu, sum ikki hava konu og børn.

Sum vit hava skilt, er tað, sum irriterar mest, at teir ikki hava loyvi at koyra skjótari enn 70 km/t, tí ofta mugu teir skunda sær at náa eini ferju, og um teir ikki klára tað, verða teir noyddir at bíða eina góða løtu, og tað seinkar eisini arbeiðinum.

Tá vit komu á saltsøluna, var tað ein góð løta at bíða, meðan ein maður fylti vognin við salti. Aftaná ein góðan tíma sluppu vit avstað aftur við 30 tonsum av salti.

Á veg norður aftur var eitt sindur av svartakálki, tá blivu vit eitt sindur bangnar, tí hvat kundi ikki hent, um ein so stórur og tungur bilur fór á glið? Men vit litu á sjaførin og komu til húsar aftur í øllum góðum.

Hetta var ein fínur túrur, men vit vóru báðar samdar um, at hetta er ikki eitt arbeiði, vit høvdu kunnað hugsað okkum, tí at tað er eitt krevjandi arbeiði og serliga um veturin, tá tað er kavi og hált, tá skalt tú ikki verða bangin av tær..

Men tað er eisini flott, at konufólk tora at átaka sær eitt slíkt arbeiði!!

**Sólrun og Rannvá**